# Álit

# í

**løgtingsmáli nr. 93/2009: Uppskot til samtyktar um at basa ungdómsarbeiðsloysinum**

Tjóðveldi hevur lagt málið fram tann 10. februar 2010, og eftir 1. viðgerð 23. februar 2010 er tað beint Vinnunevndini. Tann 19. mars hevur løgtingsformaðurin longt freistina at lata álit í málinum til 6. apríl 2010.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundum tann 2., 18. og 25. mars og 15., 22. og 26. apríl 2010.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við Beintu Á. Gregersen, umboðandi Húsið og verkætlanina ”ung í arbeiði” í Klaksvík, og við umboð fyri arbeiðsbólk, ið er settur at viðgera spurningin og skriva álit um ungdómsarbeiðsloysi.

Uppskotið er við skrivi frá Vinnunevndini tann 2. mars 2010 sent til ALS og Arbeiðsmarknaðardeildina hjá Almannastovuni við áheitan um at fáa skrivligar viðmerkingar til uppskotið. Svarfreistin varð sett til 14. dagar. Tann 19. mars hevur Vinnunevndin rykt Almannastovuna eftir svari í málinum og biðið um hagtøl, ið lýsa støðuna viðvíkjandi ungdómsarbeiðsloysinum. Sama dag varð uppskotið sent til ummælis hjá Vinnuhúsinum, og Mentamálaráðið varð biðið um at útvega nevndini hagtøl fyri, hvussu nógv søkja inn á miðnámsskúlar, lærupláss o.a., nú arbeiðsloysi er vaksið í mun til, tá arbeiðsloysi varð lægri. Svarfreistin til Almannastovuna, Vinnuhúsið og Mentamálaráðið varð sett til eina viku.

Tann 12. mars hevur nevndin fingið svarskriv frá ALS, dagfest 11. mars 2010, við viðmerkingum til uppskotið, og við skrivi, dagfest 26. mars 2010, hevur nevndin fingið hoyringsskriv frá Føroya Arbeiðsgevarafelag. Nevndin hevur einki frætt frá Almannastovuni og Mentamálaráðnum.

Frá Beintu Gregersen fekk nevndin upprit um ungdómsarbeiðsloysi 2010, sum varð framleitt til fundin, eintak av skrásetingarskjali til arbeiðsávísingina, sum ”Húsið” í Klaksvík hevur tikið stig til, umframt eintak av tíðindablaðnum ”Húsið.fo”, 1. útgáva, frá februar 2010.

**Ein meiriluti** í nevndini (Katrin Dahl Jakobsen, Bjørn Kalsø, Bjarni Djurholm, Heðin Zachariasen, Mikkjal Sørensen og Kári P. Højgaard) heldur, at vit eiga at skipa so fyri, at tiltøk og skipanir eru klárar til eina og hvørja tíð, soleiðis at vit eru betur tilbúgvin at loysa slíkar trupulleikar, tá hesir stinga seg upp. Tiltøk, sum kunnu tillagast í mun til, hvussu útbúgvingarverk, arbeiðsmarknaður og sosiala støðan hjá tí arbeiðsleysa er.

Tíverri hevur arbeiðsloysið eisini hjá okkum verið vaksandi, líka síðan heimsbúskapurin fór at rilla og er nú 6,1%. Eingin ivi er um, at arbeiðsloysi er størsta hóttanin bæði fyri einstaklingin og samfelagið alt. Fyri tey ungu er virkisloysi ein serstakliga niðurbrótandi gátt at møta á framtíðarleið teirra, sum heldur átti at verið merkt av kensluni at vera á veg. Ein gátt, sum farast má um skjótast tilber, soleiðis at teirra sosialu, arbeiðsligu og fakligu førleikar støðugt verða mentir, heldur enn skerdir sum avleiðing av hesi stillstøðu.

Undir aðalorðaskiftinum hin 18. februar um frágreiðingina Vøkstur og Virksemi boðaði Johan Dahl, landsstýrismaður í vinnumálum, frá, at arbeiðsbólkur var farin til verka, umboðandi Vinnumálaráðið, Almannamálaráðið og Mentamálaráðið, at lýsa og koma við tilmælum um tiltøk at basa ungdómsarbeiðsloysinum. Bólkurin hevur júst latið frá sær álitið, har trý høvuðstilmæli eru, sum snúgva seg um útbúgving, virkispraktikk og aktivering. Við at knýta hesi trý ráðini saman um uppgávuna í samstarvi við kommunur, fakfeløg og arbeiðsloysistryggingina, er størri sannlíkindi fyri, at tey ungu fáa ein reellan møguleika at finna sína lívsleið, heldur enn bara at verða uppihildin.

Vit kunnu fegnast um okkara góðu ALS-skipan og eisini tær broytingar, sum vóru gjørdar í mai í fjør, og sum júst nú veruliga koma okkum til góðar. M.a. víðkaðu heimildina at gera reglur um førleikagevandi tiltøk til arbeiðsleys, og at seta skipanir í verk við arbeiðsvenjingum hjá privatum og/ella almennum arbeiðsgevarum. Frá Arbeiðsloysissikipanini hevur nevndin fingið upplýsingar um teir kunningarfundir, sum tey í løtuni hava runt um í landinum, har tey ungu fáa at vita um bæði rættindi og skyldur, og hvørji tilboð skipanin kann veita teimum í teirra støðu. Møguleikin at møta teimum ungu gevur somuleiðis ALS innlit í tørv og ynski hjá teim ungu.

Harafturat verða øll ung arbeiðsleys í aldrinum upp til 25 ár kallað inn til kunningardag, har tey møta lestrarvegleiðara, arbeiðsgevara, verða kunnað um arbeiðssamleika, setanarsamrøður o.a.m.

Ein óloystur spurningur er, hvussu til ber at fáa fatur á teimum, sum ikki eru skrásett í ALS-skipanini og enn eru undir foreldranna ábyrgd. Fyri hesi er helst neyðugt, at kunning verður send í hvørt hús um, hvørjar møgulleikar hesi kunnu troyta og um avleiðingar av virkisloysi.

**Minnilutin** (Bjørt Samuelsen) tekur undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið. Minnilutin hevur hesar viðmerkingar:

Í Føroyum er ungsdómsarbeiðsloysið fleirfaldað seinasta árið. Arbeiðsloysið er í sjálvum sær ein trupulleiki, men fyri ung, sum byrja sítt vaksnamannalív við at renna seg inn í arbeiðsloysi, kann hetta lættliga skeikla sjálvsálitið, og gróðurseta eina tað-er-ikki-brúk-fyri-mær-kenslu, ið kann gerast tungt viðføri, restina av lívinum. Arbeiðssamleikin kann fara fyri bakka – og tá kann gerast trupulari at fáa fótin fyri seg aftur á arbeiðsmarknaðinum.

Seinasta heyst settu millum onnur Unga Tjóðveldið saman við Tjóðveldi fokus á hetta álvarsmál við almennum kjaki. Eitt, sum kom fram, var, at ein bólkur, sum í stóran mun er ósjónligur og tí í serligum vanda fyri at detta niðurímillum, eru tey ungu, sum ikki hava arbeiðsroyndir, og sostatt ikki eru skrásett í ALS, umframt tey, sum eru yngri enn 18 ár, og foreldrini tískil hava forsyrgjaraskyldu av. Í viðgerðini av málinum er komið fram, at eingin kann seta neyvt tal á, hvussu mong hesi eru. Partur av hesum bólki eru ung fólk, sum ikki eru bókliga áhugað. Nøkur teirra eru skúlatroytt, meðan onnur eru orðblind ella kunnu hava lættari sálarligar ella sosialar trupulleikar. Nøkur teirra kundu havt gagn av at komið á Dugniskúlan við Áir, men rúm er í verandi løtu bert fyri einum lítlum parti av umsøkjarunum. Onnur teirra eru júst liðug við skúlan, og ikki sinnað at lesa meira fyribils. Tørvur er á, at millum onnur hesi ungu fáa møguleika at sleppa í praktikk, lærupláss, ella at serstøk arbeiðspláss verða sett á stovn til teirra.

Tað var at fegnast um, tá landsstýrið í vár setti arbeiðsbólk at gera uppskot til átøk at bøta um støðuna við ungdómsarbeiðsloysinum. Í nevndarviðgerðini av uppskotinum frá Tjóðveldi segði forkvinnan fyri arbeiðsbólkin hjá landsstýrinum, at arbeiðsbólkurin vildi taka til sín fleiri ting, sum

nevndarlimir tóku fram úr uppskotinum, við í sítt arbeiði. Gleðiligt er tí eisini, at tilmælið, sum nú er komið frá Vinnu-, Almanna- og Mentamálaráðnum, í stóran mun eru samanfallandi. Her verður serliga hugsað um miðnáms- og útbúgvingarpláss til skikkaðar umsøkjarar umframt virkispraktikkir og fleiri læurpláss.

At stríðast ímóti Ungdómsarbeiðsloysinum og geva teimum ungu ymiskar møguleikar fyri starvsroyndum, ígongdsetan og betri útbúgvingarmøguleikum, er eitt mál, sum allir flokkar taka undir við.

Við uppskotinum til samtyktar heitir Løgtingið á landsstýrið um at koma við ítøkiligum lógaruppskotum, sum kunnu minka um ungdómsarbeiðsloysið.

Ein slík felags staðfesting frá Løgtinginum er sostatt ein góð uppfylging til álitið, sum nú er komið frá landsstýrinum. Við hesum kann Løgtingið strika undir, hvussu stóran skund tað hevur, at ítøkilig átøk verða sett í gongd beinanvegin, so tey ungu verða spard fyri at ganga fyri einki, við øllum teimum neiligu árinunum tað førir við sær.

**Vinnunevndin, 27. apríl 2010**

| | | |
|---|---|---|
| Katrin Dahl Jakobsen<br>formaður | Bjørn Kalsø<br>næstformaður | Heðin Zachariasen |
| Bjarni Djurholm | Mikkjal Sørensen | Bjørt Samuelsen |

Kári P. Højgaard